– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Hugnalig hús í Fuglafirði

**Frálíku húsini standa sera væl fyri á Gjógvarávegi 3 í Fuglafirði.**









## Fyrsta fatanin

Fyrsta fatanin, tá tú kemur til húsini, er, at her er talan um eini sera hugnalig eldri hús.

## Húsini – ljós og luft

Húsini eru væl hildin og í sera góðum standi. Í 2005 vórðu húsini endurbygd øll, sum tey eru. Tey standa sera væl fyri mitt í býnum, og tætt er til allar hentleikar. Har er veðurgott, og tú hevur útsýnið yvir allan fjørðin. Húsini standa beint við sandin, og tað er gangandi frá urtagarðinum beinleiðis oman á sandin. So hetta er eitt satt paradís bæði fyri børn og vaksin.

## Stílur og snið – inni og úti

Stílurin er ein blandingur av tí lætta og ljósa og av eitt sindur eldri, myrkari stíli. Garður/urtagarður við girðing er rundan um húsini. Í urtagarðinum er eitt úthús, sum kann nýtast til mangt og hvat. Frá urtagarðinum er trappa beinleiðis oman á sandin, har neystið eisini stendur.

## Innan

Í miðhæddini er gongd, køkur, stova, trappa upp á loftið og niður í kjallaran. Í erva er hjúnarrúm, 2 kømur og wc. Í neðra er kjallararúm/fýrrúm og brúsa.

## Fakta

| | |
|---|---|
| **Adressa** | Gjógvarávegur 3, Fuglafjørður |
| **Byggiár:** | 1928/2005 |
| **Hæddir:** | 3 |
| **Gólvvídd:** | 128 $m^2$ |
| **Grundøki:** | 220 $m^2$ |
| **Hjallur:** | ja |
| **Neyst:** | ja |
| **Úthús:** | ja |
| **Prísuppskot:** | kr. 870.000,- |









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**